Sambandið fór niður við flagginum — harðræðið fekk fótin fastan!



Sjúrður Skaale: — Eru tað veruliga 3681 føroyingar, sum ynskja eina tílíka samfelagsskipan, sum Breckmann er talsmaður fyri?

Loysing/samband, bjálvingarstuðul, farmaskip, barnsburðarfarloyvi — alt gjørdist so ómetaliga týdningarleyst 8. september 1987. Tað hvarv aftan fyri tann veruleika, at demokratiið í Føroyum henda dag varð eyðmýkt 3681 ferðir.

Demokratiið er tolið. Viðhvørt kann tað tykjast, sum tað er ov tolið. Tað letur seg nevniliga misnýta. Tað ger ikki mótstøðu, tá tað verður hótt av peningavaldinum. Tað ger ikki mótstøðu, tá tað verður hótt av peningavaldinum. Tað ger ikki mótstøðu, tá rørslur taka seg upp, sum hótta sálina í demokratinum: at einhvør kann hugsa og siga tað, hann vil. Eitt demokrati er ikki sum eitt diktatur. Eitt demokrati kann onki gera einsamalt. Tað er í okkara — tínum og mínum — hondum. Verja vit tað ikki, er tað verjuleyst!

Seinastu uml. 12 árini hevur demokratiið í Føroyum verið undir støðugum trýsti. Stjórin á einum blaði í Føroyum hevur áhaldandi gjørt gjøldur burturúr og sáað hatur móti teimum, sum ikki hugsa og halda tað sama sum hann. Andsfelagar hansara vóru ikki so nógvir í byrjanini. Tí hvør føroyingur kundi t.d. taka undir við fasistiska einarrøðinum í Chile? Tað vóru fáir. Hvør føroyingur kundi taka undir við óhugnaligu hetzini móti okkara frægastu listamonnum og rithøvundum? Teir vóru fáir.

Men **stjórin** misti ikki mótið. Við eini ótrúligari arbeiðsmegi helt hann á við at speireka, jagstra og hunddálka annaðleiðis hugsandi menniskju. Og hann fekk fólk afturat sær. **Blaðið** gjørdist at endanum eitt stórt organ fyri hatri og mentanarloysi.

Stjórin er eisini tingmaður. Fyrsta hann var valdur, løgdu fólk til merkis, at nú vóru nýggj, harðrend sjónarmið komin inn um tingsins gátt. Men tey løgdu ikki so nógv í tað. Hatta er »bara Óli«, søgdu tey. Men hann gjørdist alsamt meira dominerandi. Myndaði alsamt meira flokk sín. Og við fólkatingsvalið 1984 náddi hann málinum — tá yvirhálaði hann floksformannin í persónligum atkvøðutali. Hetta dámdi ikki tí hampuliga floksformanninum og øðrum hampuligum fólki í flokkinum. Tey vildu helst, at **stjórin** fór úr flokki teirra. Men at blaka hann úr — tað tordu tey ikki. Hann fekk jú so nógvar atkvøður ...

Men í 1987 var aftur val. Og tey »hampuligu« í flokkinum gingu saman og løgdu ein taktikk, sum skuldi tryggja, at tann gamla støðan kom aftur: **Stjórin** skuldi arbeiða fyri atkvøðurnar — men tey »hampuligu« skuldu fáa tær! Tey skuldu mynda flokkin! Tey avgjørdu tí at bert *ein* av teimum »stóru« hampuligu skuldi stilla upp, soleiðis at hann fekk allar tær hampuligu atkvøðurnar og kundi yvirhála **stjóran**. Snilt, snilt — men ikki nóg snilt!! **Stjórin** fekk nevniliga meir enn helvtina av atkvøðum floksins. Og meir enn dupult so nógv sum formaður floksins, Jógvan Sundstein. »Førir hetta til formannsskifti í flokkinum«, spurdi útvarpið hann. »Nei«, svaraði tann neyðars, hampuligi floksformaðurin. »Eg fari ikki frá orsakað av einum tilvildarligum fólkatingsvali«. Tað ljóðaði hjálparleyst. Jánkasligt. Og mong tóku synd í hesum neyðars, vrakaða hampamanni. Tí øll vistu, at líka mikið hvat hann segði, so hevði tann reelli formaðurin í flokki hansara í fleiri ár verið **stjórin**. Og nú vistu veljararnir, at tað var tað, teir vildu hava. Teir forkastaðu »hampalinjuna« og valdu harðræðið!!

Hevur veljarin altíð rætt?

Tað var við stórum spenningi at eg, eins og nógv onnur, setti meg at lurta eftir valsendingini týskvøldið. Hesuferð var tað nevniliga nógv meira spennandi enn fólkatingsval plaga at vera. Tí í næstan fýra ár hevði ein fasistoidur (*eg* haldi, eftir at hava lisið Dagblaðið í langa tíð, at Breckmann er reinur fasistoidur og mótstøðumaður demokratisins, óansæð hvat rætturin sigur) umboðað okkum í Danmark. *Nú* skuldi hann niður við nakkanum! Og eg valdi Atla, tí eg helt, at hann hevði best møguleikar at basa honum.

Atli kom inn — gott! Sambandið fall — sera gott!! Men eg var ikki glaður, tá valið var av. Tí hetta gjørdist størsti sorgardagur í tí partinum av politisku søgu Føroya, sum eg havi verið eygleiðari til. Spillan, haturssáarin, mentanarloysingurin, fasistoidurin (haldi *eg*) og rasisturin (haldi *eg*) Óli Breckmann fekk nærum størsta atkvøðutal, sum nakar føroyskur politikari nakrantíð hevur fingið: 3681. Atli kom inn. Sambandið fall. — Men tað var líka við, at eg græt.

Og í viðmerking síni til úrslitið, segði Atli Dam tann beiska sannleikan: veljarin hevur altíð rætt! Og soleiðis er tað. Soleiðis eru treytirnar í demokratinum... Eg var púra fyri ongum. Eru tað veruliga 3681 føroyingar, sum ynskja eina tílíka samfelagsskipan, sum Breckmann er talsmaður fyri? Eru tað veruliga 3681 føroyingar, sum halda, at verðin er svørt og hvít? Sum eru ímóti, at vit verja náttúru okkara? Sum ikki virða okkara frægasta skaldskap sum annað enn fótatraðk? Eru tað veruliga 3681 føroyingar, sum eru ímóti Amnesty International? Sum eru ímóti, at vit veita menningarhjálp? Sum vilja, at útvarpið og sjónvarpið skulu verða stýrd av peningavaldinum? Sum vilja gera Føroyar til »en søskanse í Atlanten«? Sum halda tað vera galið at mótmæla apartheid? Eru tað veruliga 3681 føroyingar, sum halda, at øll onnur eru kommunistar? Sum taka undir við undirgravandi fasistiskum loynifelgsskapum í Danmark? Sum hálova Pinochet? ERU 3681 FØROYINGAR FASISTOIDAR.

Tað segði valið. Tað segði demokratiið. Men, sum sagt í byrjanini, so letur demokratiið seg lætt misnýta. Veljarin hevur altíð rætt í einum fult demokratiskum samfelag. Men í einum *misnýttum demokratii* er tað *ikki* givið, at hann hevur rætt! Seinastu 12 árini hevur Breckmann misnýtt skrivifrælsi okkara til óhugnaliga propagandu. Í 12 ár hevur hann sáað hatur í samfelagi okkara. — Og tað var hetta, hann heystaði týsdagin! Tað vóru ikki atkvøður, vunnar á demokratiskan hátt, men atkvøður, vunnar við haturspropagandu!!

Tað ljóðar undarligt, men tað er í hesum veruleika, at vónin liggur. Føroyska demokratiið hevur nevniliga ikki 3681 mótstøðufólk. Tey vóru »bert« offur fyri propaganduna. Atkvøðurnar vóru fruktir av arbeiðinum hjá *einum* manni. Tað er sáðið, sum hesar fruktir eru vaksnar úr — Dagblaðið — sum eru so vandamikið. Tí er tað, vit skulu mótarbeiða. Tí er tað, vit skulu geva vánalig gróðrarlíkindi. Eydnast tað, so hvørva fruktirnar av sær sjálvum.

Men hetta er sjálvandi ikki nøkur løtt uppgáva. Fólk, sum lesa Dagblaðið, lesa nevniliga ofta onki annað. Og tey kenna seg so trygg í teirri svørt/hvítu heimsmyndini, sum Breckmann málar teimum, at tey vilja ikki hoyra um nakað annað. Tey vilja ikki kenna tann kompliserað veruleikan. Tað er tí sera trupult at greiða hesum menniskjum frá, hvønn vanda tey seta bæði seg sjálvi og onnur í við at styðja hesar kreftir. Og tað verður ikki lættari, tá Breckmann eftir stóra heyst sítt helst fer at herða propaganduna munandi. Tað er bert eitt vit kunnu — og mugu — gera: sakliga at tosa við hesi menniskju fyri at fáa tey at skilja, hvat tað er, tey eru offur fyri. — Og vit mugu gera tað, hvørja ferð høvi býðst!

Listafólkið

Í eini yrking, skrivað síðst í tríatiárunum, segði tann mæti týski høvundurin Bertolt Brecht nakað soleiðis: »Eg veit væl, at tað bert er tann glaði, sum er væl umtóktur. Honum er tað, fólk tímir at lurta eftir. Og eg kundi sjálvandi sett meg at skriva um blómandi súreplatrø og heit gentubróst. Men tað einasta, ið dregur meg til skriviborðið í hesum døgum, er ræðslan av talu Førarans. Til hon er av, má eg nýta orku mína til at berjast móti henni«.

Er tað nakað Breckmann ræðist, so er tað fólk, sum yrkja, skriva og arbeiða við myndlist. Við øðrum orðum: fólk sum hugsa sjálvstøðuga, og siga tað, tey meina. Tí er tað, hann hevur ført eina so óhugnaliga hetz móti okkara frægastu listafólkum. *Hann ræðist tey!! Hann ræðist tann fría tankan!!*

Føroysk listafólk! — Serliga tit, sum skriva, yrkja og syngja — sigið sum Brecht segði! 8. september átti at fingið tykkum at lagt tey »heitu gentubróstini« til síðis eina tíð fyri í staðin at arbeiða ímóti **stjóranum**. Meir enn nakar annar eru tað *tit*, sum kunnu upplýsa og ávara fólk. Nýtið møguleikan!

➔